## Todi í hálvfinaluni

Start spældi um vikuskiftið fjórðingsfinalu í steypakappingini ímóti Lillestrøm. Todi Jónsson kom á vøllin, tá 20 minuttir vóru eftir at spæla. Støðan var tá 2-1 til Start, eftir at David Nielsen í tveimum umførum hevði lagt teir á odda. Tað tóktist, sum skuldi hetta gerast endaliga úrslitið, men í 93. minutti eydnaðist Lillestrøm at javna, og so gjørdist talan um longda leiktíð. Ikki sørt av einum vónbroti fyri Start, sum allan seinna hálvleik hevði spælt við 11 móti 10, eftir at Lillestrøm málverjin fekk reytt kort beint undan steðginum. Brotssparkið, sum førdi til hetta varð tó misnýtt, og tí var bert eina málið á muni. Her gekk alt eisini fram til seinasta minuttin, men tá setti Alex Valencia punktum við forloysandi 3-2 málinum.



## Stuttgart vann við 9 monnum

Týska felagið Stuttgart skuldi veruliga stríðast fyri sigrinum í dystinum ímóti Bielefeld. Tá ið Bochum javnaði til 1-1 við brotssparki, var verjuspælarin Ricardo Osorio so illur, at hann tók í dómaran, og so fekk hann reytt kort. Hóast ein mann færri á vøllinum legði Stuttgart seg fram um 2-1, men Bielefeld javnaði til 2-2. So fekk Antonio da Silva reyða kort, og hóast Stuttgart spældi seinastu 10 minuttirnar við 9 monnum, eydnaðist tað teimum at gera sigursmálið til 3-2.



*ÍF ætlaði sær at fáa minst eitt stig við sær heimaftur av Skála, og hóast hetta eydnaðist, so vóru fuglfirðingar vónbrotnir eftir dystin, tí teir mistu leiðsluna í evstu løtu*

*Skála*

*ÍF*

Skála-ÍF 1-1 (0-0):

# Fuglfirðingar kendu seg snýttar

**Eitt brotsspark í evstu løtu bjargaði Skála eitt stig í heimadystinum ímóti ÍF. Skála hevði meginpartin av spælinum í dystinum, men teir máttu stríðast fyri at fáa stig, eftir at málmaðurin hjá teimum fór skeivur av einum langskoti**

SKÁLA-ÍF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dysturin millum Skála og ÍF spældi ikki soleiðis av, sum tey flestu høvdu roknað við frammanundan. Skála hevur fingið nógv góð úrslit seinastu umførini og hevur mest sum fulla manning aftur, og heimaliðið var favorittur at vinna dystin.

ÍF kom til Skála at verja stigið, sum teir høvdu, tá ið dysturin byrjaði, og tí løgdu teir seg langt aftur á vøllin, og tað var líka við, at hendan ætlan tryggjaði teimum sigurin.

Skála sat á meginpartinum av spælinum allatíðina. ÍF legði stóran dent á verjupartin, og teir høvdu nógv fólk aftanfyri bóltin allatíðina. Símun Eliasen og Bartal Eliasen syrgdu fyri at halda verjuna saman, og tað eydnaðist heilt væl.

Tá ið ÍF so fekk onkrar deyðbóltsstøðu frammi á vøllin, so satsaðu gestirnir við nógvum fólki.

Skála royndi í sínum lagi at bróta ígjøgnum væl mannaðu og væl skipaðu verjuna, men tað eydnaðist sjáldan. Tá ið onkur tilboð so vóru, so vórðu tey misnýtt.

### Bólturin endaði í málinum

Eitt korter inn í seinna hálvleiki skoraði ÍF. Tað var langt frá í tráð við leikgongdina, og málið skuldi helst ikki verið komið.

Hanus Eliasen, sum hevði tað einsligt í álopinum hjá ÍF, smekkaði til úti frá. Málmaðurin hjá Skála sá møguliga í so seint, at bólturin hevði kós ímóti málinum, men tá hann so skuldi tveita seg eftir bóltin, metti hann skeivt, og so fór bólturin onkursvegna framvið honum og í málið.

Hetta gjørdi bara støðuna hjá Skála truplari, tí nú kundi ÍF veruliga halda seg í verjustøðu allatíðina og lata tíðina arbeiða fyri seg. Og tað gjørdu fuglfirðingar.

Skála hevði nakrar vandamiklar støður í brotsteignum, men tað eydnaðist teimum ongantíð at beina bóltin í málið.

### Ivasamt brotsspark

Í seinastu løtu bar tó til, og tað var eftir, at dómarin hevði bríkslað fyri brotssparki. Fuglfirðingar hildu als ikki, at talan var um nakað brotsspark, og teir kendu seg snýttar.

Liðformaðurin hjá Skála tók ábyrgdina á sínar herðar, og hann sendi bóltin í meskarnar frá brotssparksblettinum.

Harvið bjargaði Skála sær eitt stig burtur úr dystinum. ÍF hevði frammanundan vilja selt dystin fyri ein javnleik, men eftir dystin vóru fuglfirðingar sera vónbrotnir, tí tað var um reppið, at teir fingu øll stigini við sær av Skála.

Úrslitið hevði við sær, at Skála halda stand ímóti ÍF, sum togaði seg upp á javnt við B68, ið skal spæla í Gøtu í kvøld.

Longu mikukvøldið skal ÍF aftur í eldin, tá ið teir spæla avblásta dystin á Eiði umaftur.

## Keðiligur endi

Hanus Eliasen stríddist mangan einsamallur í álopinum hjá ÍF sunnudagin, og tað var ikki nøkur løtt uppgáva. Hann kláraði tó at gera eitt mál við skoti úti frá, og hetta mál mundi tryggjað ÍF øll stigini.

– Dysturin fekk ein sera keðiligan enda, tí vit hildu als ikki, at talan var um brotsspark. Ein onnur støða fyrr í dystinum líktist meira einum brotssparki, men hatta hevði einki við brotsspark at gera, sigur Hanus Eliasen.

– Frammanundan høvdu vit verið nøgdir við javnleik, men nú eftir dystin eru vit sera skuffaðir, tí vit vóru so nær við at vinna, og so skuldi tað enda soleiðis, sigur hann.

## Tað var trupult

Pauli G. Hansen, liðformaður hjá Skála, gjørdi útjavnandi málið, og hóast ætlanin var at vinna dystin, so fegnaðist hann um, at Skála hóast alt fekk eitt stig burtur úr dystinum.

-Verjan hjá ÍF stóð sera væl, og tað var trupult hjá okkum at spæla okkum til kjansir. Vit høvdu alt spælið, men vit fingu ikki rættiliga ferð á spælið. Vit høvdu tó nóg nógvar kjansir til at vinna dystin, men vit misnýttu tilboðini, sigur Pauli G. Hansen.

– Teir fáa eitt keðiligt mál, og sum dysturin nú einaferð lagaði seg, so mugu vit bara verða nøgdir við, at vit fingu javnleik, sigur hann.